Tey klassisku ungu eiga eisini pláss

Í Yngd hesafer› seta vi› ljóskastaran á tónleikaundirvísingina av ungum fólki. Sunnudagin var konsert í Nor›urlandahúsinum, har ungfólk sppældu solo saman vi› Føroya Symfoniorkestri. Hetta er fyrsta fer›in, at slíkt tiltak ver›ur roynt, men ta› er ikki óhugsandi, at ta› ikki er seinastu fer›.

Tey seks ungfólkini, sum fingu hei›urin at spæla saman vi› einum heilum symfoniorkestri, vóru útvald eftir eina kapping millum ungar tónleikarar. Dómararnir valdu seks av teimum, sum teir hildu standa seg best, og tey fingu so vinningin í Nor›urlandahúsinum sunnudagin – eitt upplivilsi sum solistur hjá einum symfoniorkestri.

A›almáli› hjá musikkskúlanum í Føroyum er at vekja áhuga millum so nógv børn og ung sum gjørligt. Ta› skal ein breidd til, á›renn vit kunnu tosa um eina elitu. Men vit skulu heldur ikki ver›a bangin fyri at geva teimum, sum hava serlig evni og serligan hug til klassiskan tónleik, eina gularót.

Tey skulu eisini merkja á sær álit, krøv og avbjó›ingar, tí ta› fær hesi fólk til at gera enn meira vi› ta›. Og spyrst onkur serliga dugnaligur tónleikari burtur úr, er ta› til fragd og gle›i fyri okkum øll.

Áhugin millum børn og ung fyri at spæla tey ljó›førini, sum vanliga ikki eru at finna í teimum mongu popp- og rockbólkunum er stórur, og ta› er umrá›andi at hesi ungfólk fáa høvi til spæla, fáa undirvísing og at gerast betri. Harvi› skulu umstø›urnar, sum skulu til, eisini ver›a so gó›ar, tær kunnu ver›a. Og at ta› nú frættist at eini 1300-1400 børn og ung standa á bí›ilista og ikki sleppa fram at teirri undirvísing, sum tey gjarna vilja hava, eigur ta› at fáa onkran at taka máli› upp.

Ta› kann ikki ver›a rætt, at so nógv børn og ung ver›a útih‡st frá tónleikaundirvísing, tá vit samstundis hugsa um, at musikkskúlin var› nógv skerdur í 90'unum, og ongantí› hevur fingi› ágó›an av betri tí›unum.

Popptónleikarar eiga vit nógv av, og teir eru dugnaligir. Tveir av teimum bestu kom um mána›arskifti› til Føroya at spæla á tveimum stórum konsertum. Ey›un og Terji, sum hava skriva› so nógv hitt gjøgnum ár og dag, skulu nú enn einafer› royna at undirhalda stórari fjøld, og ta› fara teir at gera saman vi› dugnaligum tónleikarum. Inni í bla›num ber til at lesa meiri um hesi tiltøk.

Eisini eru tí›indi at frætta um n‡ggju fløguna hjá Aqua, umframt at vit ummæla fløguna á baksí›uni í Yngd. Og so eru ta› tey eiggiligu undirklæ›ini, sum vit geva rúmd í bla›num hesafer›.

Send inn og vinn

3arin letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

Miðnámsferðin hjá 98 b

Allir vegir føra til Róm

Vanligt er, at flokkar á mi›námsskúlunum fara á námsfer› (aloftast) í ø›rum londum. Men hví? Er hetta ein fer›, i› inngongur einum parti av lesi- og útbúgvingarætlanini, ella er hetta bert ein møguleiki at bróta frá tí ke›iliga gerandisdegnum vi› bókum og turrum terpingum? Ætlanin vi› fer›ini er óiva, at vit skulu nema okkum kunnleika til ta søgu og mentan, sum vi›komandi sta› hevur at bjó›a uppá. Men vist er, at tí›in ikki bert ver›ur n‡tt til, at granska søgu og mentan sum ein annar bókormur.

98 b skal sum flest allir mi›námsskúlar eisini á námsfer›. Fer›in gongur til Róm, og datoin, i› fari› ver›ur av landinum, er sett at vera tann 25/2 `00. Fari› ver›ur vi› flogfari úr Føroyum til Danmarkar, har i› vit skulu vera í 2 dagar, og sí›ani gongur lei›in til T‡sklands vi› ferju. Eftir stuttan ste›g ver›ur umsí›ir fari› vi› toki til Róm.

Ì flokkinum ganga 20 næmingar, sum sí›stu tí›ina hava gingi› og bí›a› í spenningi eftir tí stóra degnum farast skal avsta› til Róm. Vit eru troytt av at sita á skúlabeinki og glø›a og leingjast nú bert eftir at sleppa av hesum køldu oyggjum og ni›ur í tann su›urlendska hitan vi› víni og gó›um lívi - La Dolche Vida - ta› søta lív›, sum italiumenn taka til.

Tá i› vit tey mongu køldu vetrarkvøldini gingu húsagongd og spurdu naka› solei›is" gott kvøld, vilja tygum unna einum fátøkum studenti eitt oyra vi› at keypa ein lutase›il ella bá›ar tveir til frama fyri okkara námsfer›", var aftursvari› til tí›ir merkt av hvøssum eygnabrá›i og kaldligum snerki, at henda fer›in bert var› n‡tt til drykkjuskap og ørvitis náttarlív. Men av tí at føroyingar ikki klára so væl at tálma sínum ludomanii, so bar aloftast til at sleppa av vi› ein um ikki fleiri se›lar.

Rómverska ríki› hevur í fornari tí› veri› eitt stórveldi og at kalla mi›depil í øllum tí moderna›a heiminum, sum hann tá sá út. Nú er hann ikki størri enn a›rir stórb‡ir í heiminum, men enn síggjast leivdir av einari sannari stórleikatí› vi› stásiligum bygningum, i› kunnu lesast sum ein minnisvar›i yvir ymsar søguligar hendingar.

Til eina so stóra fer› krevst sjálvandi ein stór og væl samskipa› fyrireiking og sjálvandi eisini peningur. Fyri at fíggja hesum tiltaki› vór›u nógv ymisk tiltøk sett í verk. Roynt var› fyrst vi› køkutombola, men hetta vísti seg ikki at geva ta› stóra av sær. Hvør næmingur setti 200 krónur inn á felagskonto um mána›in, og lutase›lar vór›u seldir í hópatali, og hetta vísti seg at vera ta›, i› veruliga gjørdi munin.

Fyri at fáa sum mest burturúr tí, i› ver›ur at síggja, hava vit n‡tt nógvar skúlatímar at kunna okkum um tær søguligu hendingar, i› Róm hevur veri› fyri, so at ta›, i› vit fara at síggja, gerst samanhangandi og kann festast vi› ta› tí›arskei›, fornminnini eru sprotin úr.

Námsfer›in inniber millum anna›, at lati› ver›ur ein skrivlig frásøgn um okkara fer›aminni, og tí hildu vit bá›ir, at hetta eisini var ein upplagdur møguleiki at lata frásøgnina til Sosialin, solei›is at lesarin fær ein møguleika at gle›ast yvir okkara ógloymandi fer›aminni; men partvís eisini, at vit kunna vinna nøkur oyru.

Ta›, sum allarhelst ver›ur sera áhugavert at síggja, ver›ur t.d. Pompei, Kolloseum, Vatikani›, Pæturskirkjan og kanska sjálvur pávin. Ta› liggur nú einafer› solei›is fyri, at ári› í ár er ta› sokalla›a jubilári› í Róm. Hetta ver›ur hildi› hvørt 25. ár, og tá koma sera nógv fer›afólk til b‡in á vitjan. Ein ovurstór trappa gongur frá Pætursplássinum upp til Pæturskirkjuna. Fimm inngongdir eru til forhøllina í kirkjuni, og ta› portri›, i› er longst til høgru ver›ur kalla› heilaga portri› (Porta Santa), og ta› opnast bert í jubilári kirkjunnar

Sum sagt, so er Róm ein elligamal b‡ur, men hetta merkir ikki, at søga hansara er komin at enda. Endamáli› vi› fer›ini er eisini at uppliva samtí›armentanina og nøkur av teimum meira nútí›arkendu tiltøkunum. Róm er enn ein livandi og spennandi b‡ur, i› hevur nógv at bjó›a, eisini tá i› ta› kemur til nútí›armentan. T.d. er fótbólturin sera nógv frammi í Italia, og ætlanin er eisini at fara til onkran fótbóltsdyst. Ta› sera sjarmerandi og lívliga náttarlívi› er eisini eitt ey›kenni, i› helst fer at tiltala teimum flestu av okkum.

Vónirnar eru nógvar, og vónandi fáa vit eina gó›a og minniríka fer›, men hetta fáa tit høvi til at lesa um í einum framhaldi seinni í bla›num, tá i› vit eru komin aftur av fer› okkara.

Fakta um Róm:

Róm er høvu›sta›ur í Italia
Stødd: 1.507,6 km2
Íbúgvar: 2,8 mill.
Sta›: Róm liggur ca. 20 km eystanfyri munnan á Tiberánni